# Fýra kvinnur við gyltum hondum

**Fýra kvinnur úr Norðoyggjum, Eydna Dragaberg, Eghild Poulsen, Ebba Jacobsen og Laura Køtlum, hava júst, sum tær fyrstu í Føroyum, tikið eitt skeið í sokallaðari stólamassasju**

MASSASJA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Massasjan, sum tær fýra nú eru farnar í holt við, kallast stólamassasja. Hetta er ein øðrvísi massasja enn tað, sum ein vanliga kennir. Tí her er talan um eina massasju, har ein situr í einum serligum stóli og verður masseraður um ryggin niður til lendarnar, nakkan og høvdið og armarnar, hendurnar og fingrarnar.

Hetta kvøldið, tá Sosialurin tosar við tær, eru tær staddar á matstovuni Hereford, tí tær júst hava lokið próvtøkuna. Tær sita og hugna sær, meðan tær greiða frá, hvussu alt hetta byrjaði.

Tær hoyrdu um hesa massasjuna og teknaðu seg so til eitt skeið, sum var her í Føroyum í desember í fjør. Síðani tað hava tær vant nógv. Treytin fyri at fáa prógvið sum stólamassøsur eru 100 skjalprógvaðar massasjur umframt skeiði sjálvt.

Fyri at kunna luttaka á einum tílíkum skeiði, skal ein kenna musklarnar frammanundan. Tríggjar av teimum eru massøsar og ein er zoneterapeutur.. Tær hava verið á fleiri stovnum og fyritøkum og roynt hetta. Og tær hava ikki fingið annað enn positiv aftursvar.

– Øllum dámar tað, sigur Eydna, og hinar nikka samtykkjandi.

Mitt í øllum sigur Eghild, at nú er stólurin komin. Hon hevur ringt eftir honum, og áðrenn ein veit av, so hava tær sett stólin upp í gongini í Hereford, og har verður blaðkvinnan masserað. Eri ikki ein av teimum, sum dámar massasju so væl, so eg hugsi við mær sjálvari, at tað verður torført at skriva um. Men henda massasjan ger eitt hvørt annaðleiðis við kroppin. Ein slappar fullkomuliga av, og ilt fær ein ikki, hóast massørurin finnur trykkpunkt allastaðni á rygginum og ørmunum. Men ein merkir sanniliga, hvar tey eymu støðini sita.

– Við nøkrum massasjum, so skuldi hetta verið burtur, sigur Laura, meðan hon masserar. Hetta er uttan iva ein tann besta massasjan, sum ein kann fáa, tá ein ikki flytur seg so nógv gjøgnum ein arbeiðsdag. Tey, ið sita á skrivstovu ella standa á virkjum, høvdu havt gott av hesum. Púra vist.

Prátið gongur dúgliga millum tær, meðan Laura masserar.

Slappar hon nú av? Situr hon rætt? Og so framvegis. Men eg merki ikki nakað annað enn bara, hvussu betur og betur eg verði fyri.

Eydna Dragaberg greiðir frá, at tær serliga fara at miða í móti at fáa fyritøkur at veita starvsfólkum teirra hesa tænastuna. Tí hetta er ein flytibar tænasta, har tær kunnu koma til fyritøkuna við stólinum, og so kunnu starvsfólk fáa massasjuna, sum varðar í umleið eitt korter.

– Hetta er ikki viðgerð í sjálvum sær, men heldur talan um fyribyrging, leggja tær allar dent á.

Hetta slagið av massasju hevur vundið meira og meira upp á seg í Danmark. Og fyritøkur hava merkt eina munandi niðurgongd av sjúkradøgum hjá starvsfólkunum. Heilt upp í 25 % færri sjúkradagar hjá summum fyritøkum.

Men tað er sjálvandi ikki bara til fyritøkur. Einstaklingar kunnu eisini bíleggja sær massasju.

– Hetta er ein massasja, har tú verður masseraður sum tú er - bara sitandi í staðin fyri liggjandi. Sum tú er, har meini eg við, at ein er í klæðum, sigur Eydna og leggur afturat, at tað at skula úr klæðunum helst ofta hevur hildið fólki aftur í at biðja um massasju.

Eydna og hinar tríggjar hava stórar ætlanir hesum viðvíkjandi. Tær siga, at um tað verður eftirspurningur aðrastaðni frá, so fara tær at ferðast kring landið við hesum.

Tá massasjan er av, verður takkað fyri frá báðum pørtum. Tær fara uppaftur at fáa sær kaffi omaná, meðan eg fari so væl fyri útaftur í sirmið við tankanum um, at hesar fýra hava við teirra skeiði ognað sær gyltar hendur, sum uttan iva fara at hjálpa mongum fólkum framyvir.



*Tær fýra Eghild Poulsen, Laura Køtlum, Eydna Dragaberg og Ebba Jacobsen hava júst lokið skeið í stólamassasju, sum tær fyrstu í landinum*

# Nýggj útbúgving innan dementsjúkur



*Um hálvan september byrjar eitt skeið á hotel Vágum, sum Alzheimersfelagið skipar fyri, har luttakararnir fyri fyrstu ferð kunnu taka eina útbúgving innan dementsjúkur í Føroyum*

**Tann 15. september skipar Alzheimersfelagið fyri skeiði á Hotel Vágum. Talan er um eitt skeið, har luttakararnir ogna sær meir vitan innan dementsjúkur, og tá skeiðið er lokið, kunnu tey kalla seg dementkoordinatar**

ÚTBÚGVING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Talan er um nakað heilt nýtt í Føroyum. Frammanundan eru tað bert trý fólk í landinum við hesari útbúgvingini. Og tey tóku hana í Danmark. Men nú fer so at bera til fyri fyrstu ferð at fáa hesa útbúgvingina í Føroyum.

Tað er Alzheimersfelagið, sum hevur tikið stig til hetta. Og tað gera tey, tí tey meta, at tað so avgjørt er tørvur á tí. Hóast ongi tøl eru fyri dementsjúkum í Føroyum, so vísa tøl í Danmark eina øking í hesum sjúkum.

– Tað er ein rúgva av vitan um hesar sjúkurnar, sum vit fáa við hesum skeiðinum, sigur Randi Absalonsen, sum er nevndarlimur sum avvarðandi í Alzheimersfelagnum.
Skeiðið byrjar sum sagt um hálvan september, og tað verða 15 luttakarar. Hesi fara so eftir lokið skeið at kunna víðariføra teirra vitan og halda skeið fyri øðrum innan starvsøkið. Ein skal hava onkra útbúgving innan heilsuverkið fyri at kunna taka hesa útbúgvingina. So hon kann kallast ein yvirbygningur, har ein ognar sær serliga vitan innan dementsjúkur.

Skeiðið verður í trimum modulum. Tað fyrsta í september, síðani í desember og so í februar komandi ár. Síðani skulu tey skriva eina endaliga uppgávu, og so eru tey dementkoordinatar.
Alzheimersfelagið fegnast um, at tað nú fer at bera til at taka hesa útbúgvingina í Føroyum, tí harvið slepst undan at senda fólk til Danmarkar.



*Av misgáum kom hendan myndin av læknamiðstøðini í Klaksvík ikki við í blaðið í gjár. Men talan er also um ein bygning upp á knappar 700 fermetrar, sum liggur við síðuna av politistøðini í Klaksvík. Og fyri stuttum gjørdu Klaksvíkar kommuna og Tryggingarfelagið Føroyar ein sáttmála um, at Tryggingarfelagið skal byggja tann norðara partin av bygninginum, sum er áleið somu støðd, so alt í alt verður talan um ein bygning upp á knappar 1.400 fermetrar.*
*Læknamiðstøðin fer uttan iva at merkja ein munandi bata í umstøðunum hjá kommunulæknunum í Klaksvík, sum í dag halda til í hølunum, har Sjóvinnubankin húsaðist tann tíð tað var.*



# Tann ótroyttiligi blaðstjórin

**– Tann allarstørsta uppgávan hevur verið at menna Sosialin frá at vera eitt meira og minni partapolitiskt blað til at vera eitt tíðindablað fyri allar føroyingar. Hetta er í dag grundarlagið undir sjálvum eksistensinum hjá blaðnum, sigur Jan Müller, sum í dag hevur starvast í 25 á Sosialinum**

INTERVIEW
*Eyðun Klakstein*

Hann er kendur sum tann ídni ábygdarblaðstjórin, og fólk, sum starvast saman við honum, verða ferð eftir ferð ovfarin av hansara ótroyttiliga arbeiðið fyri hjartabarninum, Sosialinum.

Í dag eru 25 ár liðin, síðani hann sum nýútbúgvin journalistur kom í starv á Sosialinum, og hóast hann ikki ætlaði, at hetta skuldi haldast, so hava fólkini kring hann skipað fyri móttøku og veitslu.

Og í dagens anledning gera vit eina samrøðu við ábyrgdarblaðstjóran her á blaðnum.




*Jan Müller á redaktiónini hjá Sosialinum, har hann hevur starvast í 25 ár. Hann ætlar sær ikki at gevast á hálvari leið sum blaðstjóri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Valdi journalistikkin

Jan Müller er farin um tey fimmti árini, og helvtina av sínum lívi hevur hann starvast á Sosialinum. Eftir at hann hevði tikið prógv sum studentur í 1971, og síðani læs á hægri læristovni í bæði Danmark og í Føroyum, fór hann á blaðmannaskúla í Danmark. Hann tók prógv í 1978 og fór eftir tað beint í starv á Sosialinum.

*Hví gjørdist tú journalistur?*

– Tað er helst ein samanblanding av nógvum. Fyri tað fyrsta tí eg eri vaksin upp í einum heimi og umhvørvi við journalistikki. Man kann siga, at eg havi fingið tað inn við móðurmjólkini, nú pápi mín virkaði sum blaðmaður alt sítt lív fyrst á Dimmalætting og seinni sum freelansari fyri føroyskar og útlendskar fjølmiðlar. Síðani man tað stava frá mínum áhuga fyri at skriva og einum ómettandi áhuga fyri øllum tí, sum fyriferst rundum um meg heima sum úti í stóru verð. Eisini botnar tað helst í mínum áhuga fyri samskiftinum millum menniskju.

*Hvussu var tað at fara frá starvinum sum blaðmaður til at gerast blaðstjóri?*

– Á einum so lítlum arbeiðsplássi sum Sosialinum loysa fólk ofta sera ymiskar uppgávur, og áðrenn eg gjørdist blaðstjóri, hevði eg av og á onkrar blaðstjórauppgávur, meðan blaðstjórin kanska skrivaði meira onkuntíð. Vit arbeiða sum eitt team, og tí yvirlappa uppgávurnar og størvini eitt sindur. Eg merkti ikki nakra stóra broyting, men kanska slapp eg betur at arbeiða við teimum evnunum, sum eg hevði hug til, eftir at eg varð blaðstjóri.

## Tann største avbjóðingin

Hvat hevur verið tín største avbjóðing í tíðini á Sosialinum?

– Tað hava verið nógvar stórar og spennandi avbjóðingar á vegnum. Vit fóru frá trimum til fimm útgávur um vikuna í einum lopi, vit tóku teldur í brúk, fyri nógvum árum síðani fluttu vit í egið blaðhús við prentsmiðju, vit eru farin út á internetið, vit hava gjørt strategiskt samstarv við aðrar fyritøkur, og vit hava gjørt nógv við at koma út um alt landið sum blað. Men tann allarstørsta uppgávan hevur verið at menna Sosialin frá at vera eitt meira og minni partapolitiskt blað til at vera eitt tíðindablað fyri allar føroyingar. Hetta er í dag grundarlagið undir sjálvum eksistensinum hjá Sosialinum, og høvdu vit ikki gjørt hesa týðandi broyting, so var blaðið ikki til í dag.

*Hvat hevur verið tann størsti sigurin sum blaðstjóri?*

– Tað hevur verið, at vit hava yvirlivað sum blað, hóast blaðdeyðin bæði heima og burturi hevur gjørt enda á óteljandi bløðum. Og so at tað nú eru so nógvir føroyingar, sum hvønn dag lesa Sosialin.

*Hvussu heldur tú, at tað gongst blaðnum at halda eina journalistiskt ópolitiska linju, sum málið hevur verið í nógv ár?*

– Tað kunnu onnur meta um. Vit eru øll menniskju, og vit eru øll drigin av ymiskum áhugamálum og meiningum, hóast vit vilja vera objektiv. Tað er alla tíðina ein menning fram ímóti objektiviteti. Men eitt kann eg siga fyri púra vist. Sosialurin fer ongantíð aftur til ta gomlu partapolitisku linjuna, tí er tann vissi deyði fyri blaðið.

*Hvat hevur verið tað størsta tapið í tíðini sum blaðstjóri?*

– Tað hava sjálvandi verið nógvir trupulleikar á vegnum, men vit hava vunnið á teimum flestu. Eg vil tó siga, at tað største menniskjaliga tapið var, at vit mistu fyritaksstjóran Kristjan Dahl. Hann var eitt fantastiskt menniskjað og doyði alt ov ungur.

## Vakin alt døgnið

*Tú ert kendur sum blaðstjórin, sum ongantíð heldur frí. Eigur arbeiðið sum journalistur ikki at vera frá átta til fýra?*

– Sjálvandi eiga journalistar, sum øll onnur, at hava rímiliga arbeiðstíð, men tað skerst ikki burtur, at vilt tú verða ein ordiligur journalistur, so mást tú hava eygu og oyru opin 24 tímar um døgnið. Tú skalt ikki altíð arbeiða, men tú mást vera til reiðar at lofta søgum. Tað hevur nógv at siga fyri eitt blað, at tú hevur slíkar journalistar.

*Hvat heldur tú sum blaðstjóri um journalistar?*

– Eg má halda alt gott um teir, tí teir eru ein trygd fyri, at eg kann hava hetta starvið. Eg haldi, at journalistar bæði fyrr, nú og framyvir hava eina sera týðandi uppgávu í samfelagnum við at upplýsa og seta kritiskar spurningar til tað, sum fer fram.

*Størsti kappingarneytin hjá Sosialinum á blaðmarknaðinum er Dimmalætting. Hvat heldur tú Dimmu?*

– Eg havi stóra virðing fyri Dimmalætting. Blaðið hevur 125 ár á baki, meðan vit bara eru gott 75 ár, so vit skulu hava virðing fyri aldursforestanum í blaðheiminum. Eg haldi eisini, at Dimma hevur givið okkum viljan til at gera eitt gott blað. Ofta eru kappingarneytar fíggindar, men soleiðis er ikki hjá okkum. Vit hava til dømis gjørt ein felags prentsmiðju, og tað má vera einstandandi í Føroyum, at tveir kappingarneytar av hesum slagnum kunnu gera eina felags íløgu, hóast stóru kappingina, sum annars valdar millum fyritøkurnar.

*Hvussu leingi ætlar tú at halda fram sum blaðstjóri?*

– So leingi, sum eg orki og fólk vilja hava meg her. Tað er eisini umráðandi fyri meg, at eg havi nakað at kempa fyri, og sjálvt eftir 25 ár á Sosialinum veit eg, at vit hava nógvar stórar avbjóðingar fyri framman, hóast vit eru komin sera langt hesi árini. Eg ætli mær ikki at gevast á hálvari leið.